## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eitt skifti regn. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av suðri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men támut veður. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og seinnapartin væntandi regn. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin mánadagin millum 4 og 7 stig, men týsdagin kaldari.

# Tann stongdi býurin…

**Tað førdi til satt ferðslukaos á Kongabrúnni, tá Kopargøta mánadagin varð stongd fyri allari ferðslu, og tí broytti Tórshavnar býráð týsdagin avgerð.**

FERÐSLA
*Eirikur Lindenskov*



*Mikudagin tóku menn frá Tórshavnar býráð burtur ferðsluforðingarnar, og koyrandi eru nú aftur eftir Kopargøtu og niðan eftir Áarvegnum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tey, ið standa fyri handlunum í miðbýnum í Havn vóru ikki blíð, tá Tórshavnar kommuna mánadagin stongdi hina høvuðsinnkoyringina til miðbýin.

Herfyri var Tórsgøta stongd, tí har verða ymsar veitingar skiftar út. Har verður ikki koyrandi aftur fyrr enn í summar.

Í síðstu viku lýsti Tórshavnar kommuna í bløðunum við, at Kopargøta (aftan fyri Café Nátúr) varð stongd frá mánadegnum av, og at tað í eina tíð framyvir bert verður loyvt at koyra oman eftir Áarvegnum.

Úrslitið av øllum hesum varð, at tað bara varð koyrandi til miðbýin í Havn eftir trongu Sigmundargøtu út í Rættará og eftir smølu Gríms Kambandsgøtu.

Meðan Kopargøta hevur verið stongd, mándagin, týsdagin og út á mikudagin, hevur lítið skil verið á ferðsluni har, og valdaði satt kaos á Kongabrúnni, har summir bilar vendu við, meðan nøgvir teirra brutu ferðslulógina við kortini at koyra niðan eftir Áarvegnum ímillum Café Nátúr og Hotel Djurhuus, har ikki hevur verið loyvt at koyrt í mannaminni

Tað er tekniska nevnd hjá Tórshavnar býráð, ið tekur slíkar avgerðir. Vit royndu at koma á tal við borgarstjóran, tekniska stjóran, býarverkfrøðingin og formannin í teknisku nevnd, men eingin teirra var at hitta.

Sum Sosialurin skilir, so hevur Jan Christiansen, borgarstjóri givið teknsiku nevnd eina »nøs« fyri vánaliga tilrættislegging.

Miðbýarfelagið í Havn kravdi at fáa fund við býráðið, og var hesin fundur týsdagin. Sama kvøld varð avgerðin um at steingja Kopargøtu broytt, og mikudagin vórðu forðingarnar tiknar burtur aftur, so ferðslan nú aftur gongur niðan eftir Áarvegnum.

Orsøkin til broyttu ferðsluviðurskiftini á Kongabrúnni er, at Tryggingarfelagið Føroyar skal undir eina stóra umbygging. Tryggingarfelagið eigur bygningin hjá Djóna í Geil, har Gjaldsstovan var, og hevur eisini keypt bygningin hjá Niels L. Arge. Hesir bygningar verða nú umbygdir til skrivstovu, og skal Tryggingarfelagið savna alt virksemið á Kongabrúnni. Ein liður í hesum er at taka Gjaldsstovubygningin niður, so at bert konstruktiónin stendur eftir, og tí gjørdi tekniska nevnd av at steingja Kopargøtu, so arbeiðið kundi gerast uttan at seta ferðsluna í vanda.

Men hetta arbeiðið er so fyribils útsett.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷15 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | ÷8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 14 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | ÷8 |
| Moskva | ÷5 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 11 |
| Malta | – |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 3 |
| Miami | 15 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 969 hPa. vestan fyri Skotland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður við Føroyar fríggjadagin.




Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer norðureftir og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 07/03 kl. 06⁰⁰–08/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,6°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 07/03 kl. 06⁰⁰–08/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 18,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

8. mars: Mánin næstur jørðini
9. mars: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 9. mar | 06.10 | 18.35 | 05.10 | 17.35 | 05.25 | 17.50 | 08.10 | 20.35 | 09.10 | 21.35 | 04.25 | 16.50 | 03.25 | 15.50 | 06.25 | 18.50 | 07.25 | 19.50 | 05.55 | 18.20 | 07.10 | 19.35 |
| 10. mar | 07.01 | 19.26 | 06.01 | 18.26 | 06.16 | 18.41 | 09.01 | 21.26 | 10.01 | 22.26 | 05.16 | 17.41 | 04.16 | 16.41 | 07.16 | 19.41 | 08.16 | 20.41 | 06.46 | 19.11 | 08.01 | 20.26 |
| 11. mar | 07.52 | 20.16 | 06.52 | 19.16 | 07.07 | 19.31 | 09.52 | 22.16 | 10.52 | 23.16 | 06.07 | 18.31 | 05.07 | 17.31 | 08.07 | 20.31 | 09.07 | 21.31 | 07.37 | 20.01 | 08.52 | 21.16 |
| 12. mar | 08.41 | 21.04 | 07.41 | 20.04 | 07.56 | 20.19 | 10.41 | 23.04 | 11.41 | — | 06.56 | 19.19 | 05.56 | 18.19 | 08.56 | 21.19 | 09.56 | 22.19 | 08.26 | 20.49 | 09.41 | 22.04 |